# Tiltøk í sambandi við visjóns tilgongdina í Livdini í heyst

Í sambandi við visiónstilgongdina í Lívdini í heyst verða serlig tiltøk hildin hvørt **mánakvøld, kl. 19.00 á Brekku** fram til 26. oktober 2009. Á hesum tiltøkum verða tænastuleiðarar og luttakarar í tænastunum í Lívdini (umleið 50 tænastur í tali) eftir tørni boðin á visiónsfund.

Fyri at gera visiónstilgongdina so greiða og skipaða sum gjørligt, samstundis sum tað er umráðandi at ØLL samkoman verður hoyrd, eru allar hesar tænastur býttar sundur í 8 bólkar, har hesir 8 bólkar, byrjandi frá næstsíðsta mánakvøldi, eftir tørni verða bjóðaðir á visiónsfund fyri síni virkisøki í samkomuni, 6 tey komandi mánakvøldini.

Allar tænasturnar eru bólkaðar undir yvirskriftirnar Børn/ung (hevur longu verið), hirðaarbeiði (hevur longu verið), útbúgving, lovprísan, missión, miðlatænasta, umsiting og sunnudagstiltøkini í Lívdini.

Visións tiltøkini verða hesi mánakvøld:

| Dato | Dagur | Klokkutíð | Bólkur | Stað |
|---|---|---|---|---|
| 21-sept. | mánadagur | 19.00 | Útbúgving | Á Brekku |
| 22-sept. | týsdagur | 20.00 | Høvi at luta visjónir og dreymar | Á Brekku |
| 28-sept. | mánadagur | 19.00 | Lovprísan | Á Brekku |
| ***29-sept.*** | ***týsdagur*** | | ***Húsbólkar*** | |
| 05-okt. | mánadagur | 19.00 | Missión | Á Brekku |
| 06-okt. | týsdagur | 20.00 | Høvi at luta visjónir og dreymar | Á Brekku |
| 12-okt. | mánadagur | 19.00 | Miðlatænastur | Á Brekku |
| 13-okt. | týsdagur | 20.00 | Høvi at luta visjónir og dreymar | Á Brekku |
| 19-okt. | mánadagur | 19.00 | Umsiting | Á Brekku |
| ***20-okt*** | ***týsdagur*** | | ***Húsbólkar*** | |
| 26-okt | mánadagur | 19.00 | Sunnudagstiltøkini í Lívdini | Á Brekku |
| 27-okt | týsdagur | 20.00 | | Á Brekku |

Vit fara at heita á øll, sum vara av eini tænastu ella eru luttakarar í tænastu í Lívdini, at møta upp tá tykkara tænasta verður boðin á visiónsfund mánakvøld. Allar tænasturnar fáa fyri ordan skyld, hvør sær eisini boð vikuna fyri, at tær eiga tørn, um júst hvat mánakvøld tær eiga at møta.

Um tú ikki ert við í nakrari tænastu, og kundi hugsa tær at komi við til eitt slíkt visiónskvøld, ert tú eisini vælkomin at møta upp.

Omanfyrinevndu týskvøld kl. 20 fram til 27. oktober 2009 verða harumframt øll bjóðaði at koma á møti á Brekku, har høvi verður at luta visjónir og dreymar.

Vegna praktiska fyrireikingarbólkin

Jens Wang